# Nýggja røktarheimið í Vági við at taka skap

**Vakra lendið leggur upp til at skapa ein fjálgan bygning, sum er í samljóð við lendið og vøkru nattúruna á staðnum, sigur arkitekturin**

ELDRARØKT
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú fæst ein reiðiliga góð ábending um, hvussu nýggja ellis- og røktarheimið kemur at síggja út.

Tá ið borgarstjórin í Vági, Kirstin Strøm Bech, var í almanna- og heilsumálaráðnum í farnu viku og læt inn umsókn um stuðul til eitt ellis- og røktarheim í Vági, hevði hon eisini eina ráskitsu við sær yvir, hvussu heimið kemur at síggja út.

Ellis- og røktarheimið skal vera á stykkinum, sum annars varð grivið út til miðnámsskúlan.

Tað er Albert Isfeld, arkitektur, sum hevur teknað og borgarstjórin sigur, at hon er sera væl nøgd við uppskotið.

– Sjálvsagt verða broytingar og tillagingar gjørdar, tá ið komið er longri við ætlanini, men nú sæst so ein hóming av, hvussu bygningurin kemur at taka seg út í lendinum, sigur hon.

Annars hevur verið ført fram, at tað ber illa, fyri ikki at siga, slett ikki til at leggja eitt ellis- og røktarheim á stykkinum, sum er grivið út til miðnámsskúlan.

Men arkikekturin sigur, at vakra lendið leggur upp til at skapa ein fjálgan bygning, sum er í samljóð við lendið og vøkru nattúruna á staðnum.

Hann sigur, at hann hevur lagt dent á at brúka útgrivna stykkið, soleiðis at bygningurin verður settur inn í og á tromina á beninum og tað mannaskapta og nattúran skulu sanda í samljóði við hvørt annað.

Hann hevur eisini lagt dent á at skapa heimligar umstøður til búfólkið og góðar arbeiðsumstøður til starvsfólkið.



*Soleiðis hugsar arkitekturin sær, at ellis- og røktarheimið skal síggja út, sum ætlanin er at byggja á stykkinum í Vági, sum upprunaliga varð grivið út til miðnámsskúlan*

Hann sigur eisini, at soleiðis, sum bygningurin verður settur á stykki, verða góðir møguleikar fyri at byggja út.

Hann sigur, at ellis- og røktarheimið er ætlað til 32 búfólk í tveimum deildum.

Húsið er í tveimum hæddum og tað verða 16 kømur á hvørjari deild. Hvør deild er so aftur býtt sundur í tvær eindir við pássi fyri átta fólkum í hvørjari eind.

Tvær av eindunum skulu verða sjálvstøðugar eindir rundanum eitt felagsøki við køki, matstovu og stovu, men starvsfólkarúm, vaskarí og annað, er felags við hinar deildirnar.

Í heiminum verða eisini umstøður til ergoterapi, fysioterapi, fótarøkt, hárfríðkan, samstrundis sum skrivstova skal vera til heimarøktina.




## SMYRIL LINE SØKIR SAMSKIPARA TIL ALTJÓÐA SØLU OG MARKNAÐARFØRING

Í samstarvi við sølu & marknaðarstjóran skalt tú leggja til rættis og seta í verk sølu og marknaðarætlanir í 10 marknaðum. Tú arbeiðir bæði við strategiskum og taktiskum sølu- og marknaðarátøkum. Hartil skalt tú greina og fastleggja prísir, gera prístariffar og arbeiða við sølutølum og statistikki. Tú kemur eisini at takast við søluuppfylging og samskifti við eksternar veitarar, herundir lýsingarfyritøkur.

**Vit bjóða**
Eitt fjølbroytt, avbjóðandi og mennandi starv í altjóða umhvørvi.

**Vit ynskja**
Royndir innan sølu og marknaðarføring. Viðkomandi útbúgving, t.d. cand. merc. Árræði, talskil og eitt gott grafiskt eyga. Tú mást tosa og skrive enskt, og dugir tú onnur fremmandamál er hettar ein fyrimunur. Eitt sindur av ferðing má væntast.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av møguligum prógvum skulu sendast til:

Smyril Line
P.O. Box 370
FO -110 Tórshavn
Att: Hendrik Egholm

Umsóknir kunnu eisini sendast við teldupostí til:

he@smyril-line.fo

Umsóknir skulu vera okkum í hendi innan 13.02.06 kl. 12.00

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Hendrik Egholm á tlf. 34 59 39.

SMYRIL LINE · EXPLORERS OF THE NORTH ATLANTIC

SMYRIL LINE · J. BRONCKS GØTA 37 · POSTBOKS 370 · FO-110 TÓRSHAVN · TLF 34 59 00 · FAX 34 59 50 · OFFICE@SMYRIL-LINE.FO · WWW.SMYRIL-LINE.COM